einfaldari
- ger tað einfaldari
Juli-august 2012

# Familjan Djurholm til Kambodja



*Mynd: Tórvør Vang*

Á familjumøtinum sunnudagin 24. juni vórðu Durita og Pauli Djurholm send út sum trúboðarar í Kambodja saman við teimum báðum yngru børnunum Gunnvá, 14 ár, og Jóhan, 16 ár.

Durita, Pauli og børnini fara at búgva í býnum Siem Reap, sum hevur umleið 1 millión íbúgvar. Tey fara at virka í samkomuni Siem Reap Ministries, har tey fara at boða Guds orð, undirvísa og vera við í samskipanar- og kunningararbeiðinum. Gunnvá og Jóhan fara at ganga á altjóða skúlum, meðan eldra dóttirin, Rannvá, fer til Nýsælands at lesa.

Í Kambodja búgva nú umleið 15 milliónir, harav umleið 96% eru buddistar, 2% muslimar og 1% kristin.

lívdin
– í livd hins hægsta
Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

## Neyðugt at hvíla

Hvíld er neyðug fyri okkum øll! Sjálvt Jesus mátti hvíla og stilla sín tosta, tá ið hann ferðaðist gjøgnum Samaria. Jóhannes 4:6 sigur: “Jesus, sum var móður av ferðini, sat nú har við brunnin.” Jesus sat við ein brunn og hvíldi seg og bað um vatn frá eini kvinnu, sum kom eftir vatni (v. 7). Men Jesus brúkti sína frítíð at koma í samband við eina kvinnu, sum tørvaði livandi vatn (v. 10). Máttu vit lært týdningin av at hvíla og at drekka. Men máttu vit eisini lært, at slíkar fríløtur eru møguleikar hjá okkum at geva fólki, sum Gud leiðir inn á okkara leið, livandi vatn at drekka.

Eg ynski tykkum eitt gott summar og Harrans signing!

*Jógvan Zachariassen*



# HENDINGAR & TILTØK

## Lívdin í summarfrí



Eins og undanfarin ár fara vit aftur í ár at hava ein summarsteðg í Lívdini. Eingi møtir verða í Skúlanum við Løgmannabreyt sunnudagarnar 22. juli, 29. juli og 5. august. Fyrsta møti eftir summarsteðgin verður sunnudagin 12. august. Sunnudagsskúli verður allar sunnudagarnar, tá møtir eru. Í juli verður sunnudagsskúlin tó í broyttum líki:

1. juli verða ymisk spøl á skránni
8. juli verður ein túrur gjørdur í grannalagnum
15. juli verður ein filmur sýndur

## Instrumentalfløgan “Alt av náði”



Fríggjadagin 15. juni kom nýggja instrumental-fløgan “Alt av náði” hjá Beintu Háberg Jacobsen út.

Talan er um eina fløgu, har Beinta spælir egin løg, gospelløg og klassiskan tónleik á klaver. Jákup Zachariassen hevur framleitt fløguna – og saman við føroyskum og íslendskum tónleikarum eru fleiri ymisk ljóðføri við á fløguni við tilsamans 17 fjølbroyttum løgum.

## Til lukku við barninum



21. apríl 2012 fingu Anamaria og Jákup Frederiksen ein son, sum eitur Jóhan. Hann vigaði 3050 gr og var 50 cm langur. Jóhan eigur eina systur, sum eitur Hanna, ið er 4 ára gomul.

## Brúdleyp



Leygardagin 7. juli giftast Katrina Miðhamar og Finnur V. Carlsen í Tórshavn. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 11, har øll eru vælkomin. Brúðarveitsla verður fyri innbodnum á Hotel Hafnia.

## Lívdin á Facebook

Lívdin hevur sín egna profil á Facebook, sum er: www.facebook.com/Livdin. Har verða upplýsingar um aktivitetir o.a. regluliga lagdir út.

## Summarlegurnar á Zarepta 2012




| | | | |
|---|---|---|---|
| Summarlega I (16-17 ár) | 1. juli | til | 7. juli |
| Summarlega II (15 ár) | 8. juli | til | 14. juli |
| Summarlega III (14 ár) | 15. juli | til | 21. juli |
| Summarlega IV (13 ár) | 22. juli | til | 28. juli |
| Summarlega V (12 ár) | 29. juli | til | 4. aug |
| Summarlega VI (11 ár) | 5. aug | til | 11. aug |
| Summarlega VII (10 ár) | 12. aug | til | 16. aug |
| Summarlega VIII (9 ár) | 16. aug | til | 19. aug |

www.zarepta.fo

## Iktus




Sjónvarpsrásin IKTUS sendir regluliga talur frá Lívdini. Sent verður mikudag til leygardag kl.11:00, 16:00, 21:00 og 02:00. Sunnudag frá kl.14:30 og 21:00 verður endursent frá vikuni. Sí skránna og les meira á www.iktus.fo.

## Samtalur og forbøn

Fólk frá Glóðini eru tøk aftan á seinna møtið sunnudagar at samtala ella at gera avtalu um samtalu. Glóðin er ein tænasta í Lívdini, sum er ein útrættur armur til menniskju, sum hava eitthvørt at stríðast við sum t.d. tunglyndi, ótta, sorg, vreiði, hjúnabandsviðurskifti ella tvístøður. Fólkini í Glóðini hava tagnarskyldu. Eisini ber til at venda tær til Glóðina á tlf. 280011.

# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

## Sunnudagin 1. juli

Familjumøti kl. 10.30: Heidi og Regin Guttesen siga frá verkinum í Italia

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Serlig forkunnug vitjan



Heidi & Regin

## Sunnudagin 8. juli

Familjumøti kl. 10.30: Gunnvá Áargarð sigur søgur

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Heidi og Regin Guttesen hava eitt orð



Gunnvá

## Sunnudagin 15. juli

Familjumøti kl. 10.30:

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Talari: Símun Absalonsen

## Sunnudagarnir 22. juli, 29. juli og 5. august er summarfrí



Símun

## Sunnudagin 12. august

Familjumøti kl. 10.30:

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Visiónsmøti

## Sunnudagin 19. august

Familjumøti kl. 10.30:

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Rutt (1/3)
Talarar: Unn og Jógvan Zachariassen



Unn & Jógvan

## Sunnudagin 26. august

Familjumøti kl. 10.30:

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: : Rutt (2/3)
Talarar: Unn og Jógvan Zachariassen

**Ungdómstiltøk:** Alive: Nærri verður lýst á Facebook “Ignite Lívdin”

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*